# - Eg havi gloymt allar



*Her eigur hann mangar løturnar – 40 ár hjá Strandferðsluna, og tey seinnu árini sum skipari umborð á Teistanum um Skopunarfjørð*

**Eyðun skuldi taka eina týðandi avgerð hesa januarnáttina í 1967: At fara til skips í Grønlandi, ella fara við Strandferðsluni. Hann valdi tað seinna, og her hevur hann verið í 40 ár og ein dag.**
**- Eg valdi so Strandferðsluna, og tað eri eg glaður um í dag. Hetta er eitt gott arbeiðspláss, sigur Eyðun Holm, sum í dag siglir sín seinasta túr við Strandferðsluni.**

SKIPARI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Skopunarfjørður:** - Tað var ikki nøkur stór løn, vit fingu tá – 900 krónur um mánaðin.

*„Eg kenni ikki nøvnini á øllum sandoyingum. Men eg kenni kortini tey flestu andlitini*

- Men ein visti so altíð, hvat ein fekk, sigur Eyðun, sum fór um tey 67 árini í oktober mánaði í fjør.

Tá Teistin fer av Skopun kl. 16:30 í dag, er hetta samstundis seinasta ferðin, at Eyðun stendur við róðrið hjá Strandferðsluni.

Eftir at hava tænt hesum stovninum í samfull 40 ár, er tíðin komin til at hann leggur hetta starvið frá sær.

- Nei, eg eigi ikki bát. Eg vænti at eg fari at verða nakað nógv niðri í Tilhaldinum, sigur Eyðun við einum brosi.

Í samband við at hann í gjár hevði 40 ára starvsdag hjá Strandferðsluni varð skipað fyri hátíðarhaldi umborð á Teistanum, meðan hann sigldi ein túr út í Hest.

Í dag er hetta lívsverkið hjá Eyðuni liðugt. Hann hevur latið næsta manni róðurpinnin umborð á Teistanum.

**Skjót avgerð**

Ein myrkan týsdag í januar mánaði 1967 setti bróður hansara, Bjarni seg í samband við hann.

Hesin hevði fingið til uppgávu frá stjóranum á Strandferðsluni at heita á Eyðun um at taka við einum starvi, at sigla við Sildberanum hjá Strandferðsluni.

Trupulleikin var bert tann, at Eyðun samstundis var í ferð við at rigga seg til ein langfaratúr til Grønlands. Og avgerðin mátti takast sama kvøld, tí bæði skipini høvdu brúk fyri einum góðum manni longu morgunin eftir!

Mikumorgunin 11. januar fyri 40 árum síðani fór hann á fyrsta sinni umborð á Sildberan sum manning. Áðrenn skipið varð selt til Grønlands, førdi tað mangan farmin úr Havn til Sandoy, Nólsoy, Hest og aðrar oyggjar.

Í gjár var hetta hátíðarhildið, og í dag klokkan 16:30 siglir tann 67 ára gamli Eyðun sín seinasta túr við Strandferðsluni, tá Teistin leggur frá landi úr Skopun.

- Eg haldi, at tað er í lagi at gevast soleiðis. Teir ungu mugu jú eisini sleppa framat, sigur Eyðun.

**Ein góð tíð**

Áðrenn Eyðun kom í fast starv hjá Strandferðsluni hevði hann siglt við trolara, eins og hann hevði nomið sær útbúgving á sjómansskúla.

Hann hevði frammanundan avloyst eitt sindur við gamla Smyrli – honum við tí gula skorsteininum, men annars sigldi hann úti við trolarum.

- Ein so góðan møguleika, kann ein sjálvandi ikki siga neitakk til. Soleiðis kom eg til Strandferðsluna, hóast ætlanin upprunaliga ikki var at verða verandi her.

*„Eg haldi, at tað er í lagi at gevast soleiðis. Teir ungu mugu jú eisini sleppa framat*

- Men soleiðis bleiv tað bara. Eg vil bara siga, at hetta hevur verið ein góð tíð, greiðir hann frá.

Hesi 40 árini hevur hann havt nógvar minniligar túrar millum tær føroysku oyggjarnar – sjálvandi onkrar ringar eisini.

- Men tá eg skal siga sum er, so havi eg gloymt allar teir ringu, sigur hann stillisliga.

**Mundi rent á Galvin**

At vera skipari umborð á einum feðramannaskipi er stór ábyrgd og krevur ótrúligan kunnleika til skip, veður og streym, tá leggjast skal at við tær rættiliga ymisku ferjulegurnar kring landið.

Hesi 40 árini hevur Eyðun siglt við íalt 12 skipum hjá Strandferðsluni, og hevur siglt uppá nógvar havnir á føroysku oyggjunum.

Mangan man hava verið ótespiligt at koma inn í tær ymisku innsiglingarnar,